# Kanónirnar hjá Marcello og Súna Fríða vóru bjargingin

*B68 hongur uppi í oddastríðnum, men tað var sera strevið hjá toftamonnum at fáa øll stigini av Sandi*



*Súni Fríði var aftur ein av skarprættarunum, tá B68 togaði trý stig heiman av Sandi. Saman við álopsfelaganum, Marcello, er hann nú ovast á máltindinum*

B71-B68 2-3 (2-2)

Toftamenn eru framvegis við í stríðnum um FM, Europa Cup og heiðursmerkir. Aftur hesa ferð komu teir av útivølli við øllum stigunum, og aftur hesa ferð stóð nógv á, áðrenn tað var greitt, at stigaposin var bæði fullur og tættur.

Sandoyingar løgdu sannførandi fyri. Teir eltu gestirnar alla staðni og góvu teimum ikki frið. B68 var um ein háls. B71 hevði fleiri møguleikar, og áðrenn gestirnir á Sandi høvdu fótað sær, var heimaliðið frammanfyri við tveimum málum. Um teir í B71 høvdu verið eitt sindur hepnari, og um teir høvdu havt marginalirnar við sær, so høvdu teir fyrstu løtuna kanska havt fingið eitt mál afturat, og harvið hevði dysturin ivaleyst verið avgjørdur.

Men toftamenn vóru treiskir. Tað var undirhaldandi at hyggja at. Fimm mál vórðu skorað á Sandi, har vóru nógvir málmøguleikar, góðar málverjubjargingar og viðhvørt var spælið á einari góðari leið.

**B71 løtan**
B68 var tøvandi í 1. hálvleiki. Tað er altíð torført at siga, um tað vóru mótstøðumenninir, sum vóru orsøk til tað, ella um tað bara var tí, at teir i B68 fótaðu sær illa. Men tað er ein veruleiki, at eftiransingarnar hjá B68 vóru leysar, teir vóru lítið sannførandi í nærdystunum, og teir funnu ikki hvønn annan nóg væl, tá teir royndu at byggja álop.

B71 menninir vóru ágangandi og ágrýtnir. Høgni Hansen, sum var í alopinum saman við Michael Jørgensen, arbeiddi nogv, og Kristian Nielsen var sera raskur ytst í vinstru. At hann noyddist at fara av vøllinum, tá tað restaði ein lítil hálvur tími, kom illa við hjá teimum á heimaliðnum.

B71 kom á odda beinanvegin. Langt innkast varð longt innfyri málið, og Høgni Hansen stútaði í málið aftanfyri Magnus Poulsen.

Tá vóru tríggir minuttir farnir, og eitt korter seinni lá bólturin aftur í B68 málinum. Hesa ferð var tað Michael Jørgensen, sum varð skrásettur sum málskjútti. Hann royndi seg við skoti um brotsteigarmarkið. B68 málverjin royndi at sláa bóltin burtur, men hann rakti ikki á, og góða skotroyndin endaði við máli.

B71 hevði onkran annan møguleika at skora, tá teir høvdu dystin í sínum valdi, men Magnus Poulsen vardi væl fyri.

**B68 løtan**
Fyri B68, sum hevði Jan C. Dam á aftasta manni og spældi við tveimum forstopparum, var tað sera heppið, at teir komu heilt skjótt afturíaftur, eftir at B71 tvær ferðir hevði skorað. Fyrra B68 málið í 1. hálvleiki var Marcello meistari fyri. Øssur Hansen var meistari fyri uppspælinum, og Marcello sneiddi tveir av sær og sendi í netið úr umleið ellivu metra fjarstøðu.

Súni Fríði Johannesen, sum saman við Marcello er toppskjútti í bestu deildini – báðir hava teir skorað ellivu mál – javnaði til 2–2. Hann var fyrstur á innleggi frá Marlon Jorge úr høgru. Súni Fríði stútaði, bólturin tók í ein mótstøðumann á málstrikuni, men hann kundi ikki verja fyri bóltinum, sum fór í nettakið.

Í 2. hálvleiki hevði B68 broytt upp á liðið. Eyðstein Skipanes og Bogi Petersen komu inn á ávikavíst miðvøllin og vongverjan (Jan Petersen fór í miðverjuna), og royndin við teimum eydnaðist væl. B68 verjan gjørdist væl tættari.

Tá støðan var 2–2, vóru sandoyingar illa nøgdir við, at dómarin ikki bríkslaði fyri brotssparki til teirra, ella at hann ikki vísti reyða kortið, men dómarin helt ikki við teimum, og so varð vanigt fríspark dømt.

Marcello var meistari fyri týdningarmikla sigursmálinum, tá tað restaðu níggju minuttir. Bólturin varð stungin fram til Súna Fríða Johannesen, sum inni í brotsteiginum valdi at senda upp á tvørs til púra leysan Marcello.

JH

**B71-B68 2-3 (2-2)**
1-0: Kristian Nielsen 3
2-0: Michael Jørgensen 19
2-1: Marcello 22
2-2: Súni Fríði Johannesen 34
2-3: Marcello 81

Dómari: Tummas Pauli Olsen (GÍ)

**B71:**
Valdemar Nowisci – Bergleif Sólsker, Jón Brekku, Bernhard Petersen – Jógvan Jón Petersen, Kári Nielsen, Bjørn Thorsteinsson, Eli Hentze, Kristian Nielsen – Høgni Hansen, Michael Jørgensen

**B68:**
Magnus Poulsen – Marlon Jorge, Jákup Djurhuus, Jan C. Dam, Oleif Joensen, Øssur Jacobsen – Jan Petersen, Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino



# Góð mál góvu KÍ sigurin

*2. deild: KÍ vann annan heimadystin á rað ímóti einum liði frá ovaru hálvu av stigatalvuni*

Jákup Mørk

Næstbesta liðið hjá klaksvíkingum tykist rættiliga verða komið fyri seg eftir summarsteðgin.

Leygardagin vann liði annan heimadystin á rað, og aftur hesaferð var tað ímóti einum liði, sum heldur til í ovaru hálvu av stigatavluni.

Runavíkingar vóru á vitjan í Klaksvík, men teir høvdu tað trupult ímóti heimaliðnum, sum stríddist óføra væl allan dystin. KÍ hevði mist einar seks spælarar frá seinasta dysti, men á liðnum vóru framvegis spælarar, sum kundu gera eitt sindur um seg. Á miðvøllinum spældu John Ryan og Allan Joensen og í álopinum var Tomislav Sivic.

Í fyrra hálvleiki kom einki mál, men tað var nær við nakrar ferðir. KÍ hevði fyrst tveir risakjansir. Tomislav Sivic fekk ein bólt frá baklinjuni, men úr fríari støðu úr 10 metrum skjeyt hann framvið. Karl Marius Poulsen var leysur, men skotið hjá honum var barnamatur hjá Olaf Højgaard at taka sær av.

Í hinm endanum kom NSÍ nær einum málið, tá Bergur Hansen skjeyt eitt fríspark til nærmaru stong. Í evstu løtu fekk KÍ-málverjin, Meinhardt Joensen, sligið bóltin út.

**Frálík mál**
Í seinna hálvleiki fekk KÍ hol á, tá John Ryan tók sakina í egnar hendur. Hann fekk bóltin einar 25 metrar frá málinum, og hann gjørdi ikki mætari enn at drøna bóltin í málið til 1-0 til KÍ.

Hetta fekk gestirnar at ressast eitt sindur, men teir komu ikki longur enn nær einum málið. Bergur Hansen royndi nógv í vinstru síðu, og á miðvøllinum var Jan Nónklett sera ágrýtin bæði aftureftir og frameftir.

Avgerðin í dystinum fall, tá John Ryan streyk til baklinjuna í vistru eftir eitt gott KÍ álop. Hann sendi inn fyri málið og úr einum 13 metrum tveitti ídni miðvallarin, Johannes Færø, seg fram og stútaði bóltin upp um NSÍ-málverjan og í málið til 2-0.

KÍ hevði eftir hetta tak á dystinum, og hóast runavíkingar royndu at koma fyri seg aftur, so bar tað ikki til ímóti tryggu KÍ-verjuni.

KÍ togaði seg upp umaftur Royn, og næsta vikuskiftið verður rættuligur botndystur í Klaksvík, tá hvalbingar koma á vitjan.

**KÍ-NSÍ 2-0 (0-0)**
1-0: John Ryan
2-0: Johannes Færø



# Lagt er upp til spennandi endaspurt

*Lykladystir í toppinum og í botninum eru á skránni komandi vikurnar, sum eisini fara at bera dám av altjóða uppgávum hjá feløgunum og fyrsta HM undankappingar dystinum*



*Runavíkingar hava veruliga fingið ferð á síðani summarsteðgin. Sunnudagin var tað so VB, sum varð spælt niður og norð*

Tað er møguleiki fyri, at avgerðin um, hvør skal vinna FM, kemur nógv nærri komandi vikuskifti. Men tað kann eisini vera, at tað so at siga verður eldur í toppinum, tá fjúrtanda umfarið er farið afturum.

Í trettanda umfarinum vann HB lættan sigur á heimavølli móti einum av botnliðunum. B68 hevði tað strevið á Sandi, men teir fingu trý stig og megnaðu harvið tað, sum skal megnast, um hugsningur skal vera um oddasess.

VB heilkiksaði í Runavík. Vágbingar høvdu í hesum umfarinum bara oddasessin til láns í eina viku. Nú er HB aftur fremst.

Í Runavík kendist tað eina løtu sum um VB, ið hevði havt gott tak á sær sjálvum og málskjótingini hjá mótstøðumonnunum í 1. hálvleiki, skuldi fullkomuliga missa takið í 2. hálvleiki. Teir mistu takið á mótstøðumonnunum. Frustratiónirnar vóru í 2. hálvleiki sjálvandi stórar hjá VB fólki á og kring vøllin.

Ta eina løtuna gjørdu teir fleiri fríspørk inni á vøllinum, og møguleikin tóktist nærkast, at Niklas á Líðarenda fleiri ferðir skuldi fara í lumman. Harvið lá í luftini, at fleiri av vágbingunum skuldu gerast leikbannaðir næstu ferð. Tíbetur fyri teir og spenningin í landskappingini, so komu ikki fleiri kort. Tað kendist sum um teir í VB ásannaðu, at tað var einki at gera í Runavík. VB hevði tapt, og so ráddi um at fáa tíðina at ganga í staðin fyri at royna at venda óvendandi gongd og kanska leypa framav.

Sunnudagin fáa vágbingar vitjan av HB. Tað verður spennandi. Úrslitið fer at hava stóran týdning fyri gongdina í landskappingini. Um HB vinnur í Vági, so styrkja teir so nógv um sínar møguleikar at vinna FM, at tað skulu fleiri umfør at fáa teir aftur. Hjá vágbingum verður talan um týdningarmesta dystin á árinum. Um teir vinna, hava teir beinanvegin vaskað stórtapið í Runavík av sær. Um teir tapa, kann talan gerast um aldutal.

B68 hongur framvegis í toppinum. Aftur hesa ferð gekk long tíð, áðrenn teir megnaðu at koma framum og samstundis at halda tætt, men allir sigrar telja eins nógv. Fyri toftamenn fer tað at koma best við, um VB og HB komandi sunnudag spæla javnt í Vági. B68 fær vitjan av KÍ. Klaksvíkingar plaga at standa seg væl á Svangaskarði, og tað verður aftur strevið hjá B68. Men teir kenna treytirnar. Um B68 skal hugsa um at halda seg í nánd av oddasessinum og harvið møguleikanum at vinna fyrsta FM síðani 1992, so skulu teir hava trý stig móti KÍ.

**Fleiri toppdystir á skránni**
Støðan eftir trettanda umfarið boðar frá, at tríggir toppdystir, sum fara at hava sera stóran týdning fyri, hvar FM heitið fer at enda, eru á skránni næstu vikurnar. Umframt VB–HB komandi sunnudag er talan um B68–HB í triðji síðsta umfarinum, sum verður 17. september, og so í næstsíðsta umfarinum, tá B68 fer til Vágs.

Umframt toppdystirnar verða fleiri aðrir spennandi dystir á skránni, har tað kann roknast við, at toppliðini verða noydd at vísa alt sítt kynstur fyri ikki at snáva. Her verður t.d. hugsað um, tá B68 um knappar tríggjar vikur skal til Runavíkar at spæla móti NSÍ, sum hevur sett met við at spæla seks dystir á rað uttan at tapa og við at vinna fýra ferðir á rað.

Fyri oddastríðið verður tað eisini spennandi, um GÍ, sum misti sín síðsta møguleika í Klaksvík, megnar at toga seg upp, tá teir skulu til Havnar at spæla móti HB. Vit fáa eisini at síggja, um B36 við sigrinum í Sumba hevur vent gongdini so mikið, at teir kunnu arga HB í næstsíðsta umfarinum.

Dystirnir millum KÍ–B36 og B68–GÍ eru altíð spennandi, so alt í alt kunnu vit rokna við, at talan verður um spennandi endaspurt á hesum kappingarárinum.

**Lykladystir í Sørvági og á Sandi**
Tað er ikki so langt síðani, at NSÍ ikki var so langt frá botninum. Teir hava tikið seg við ferð móti toppinum, og tað er ikki ómøguligt, at NSÍ fer at røkka fjórða plássinum og harvið plássi í Intertoto Cup. Hetta var málið, sum teir settu sær undan kappingarárinum.

Sumba, B71 og FS Vágar tapa hvørja ferð. Alvíkavæl tykist tað, sum um munurin millum B71 og liðini omanfyri er minni, enn hann er frá millum hini botnliðini og fremru liðini. Støðutalvan sigur kortini, at sandoyingar framvegis eru í niðurflytingarvanda.

Lykladystirnir í botnstríðnum eru innanhýsis uppgerðirnar millum tey trý liðini, sum eru nógv aftast. Tann fyrsta verður á skránni komandi sunnudag, tá sumbingar vitja í Sørvági. Um tað fer at eydnast hjá vágaliðnum at vinna, so verður tað meiri enn torført hjá sumbingum. 10. september skulu sumbingar til Sands, og um teir tapa báðu ferðirnar, so verður greitt, at steðgurin hjá teimum í bestu deildini er av á hesum sinni. Men sumbingar hava eisini møguleika fyri tær báðu næstu ferðirnar at spæla seg úr botninum. Avrikið hjá Sumba á heimavølli móti B36 var ikki sannførandi, men á Svangaskarði næstsíðsta sunnudag vístu teir, at møguleikin fyri, at teir kunnu vinna á útivølli móti hinum botnliðunum er ikki burtur.

**Altjóða uppgávurnar**
Næstu vikurnar eru tríggir altjóða dystir á skránni. Hóskvøldið verður punktum sett fyri Europa Cup luttøkuna hjá B36 á hesum sinni. AB telist millum oddaliðini í Danmark, og í árstalsfelagnum mugu teir vóna, at tað er satt, tá teir í AB í donskum fjølmiðlum siga, at teir fara eina hugnaferð til Føroya. B36 tapti næstsíðsta hóskvøld 8–0 í Gladsaxe.

GÍ hevur áður gjørt ein stóran vørr í Svøríki. Tað var tá teir ein fittan part av tíðini høvdu Trelleborg á krókinum. Ta ferðina høvdu teir tapt 1–0 á heimavølli. Hesa ferð er útgangsstøðan eitt sindur truplari. Undanroyndin hjá GÍ í Klaksvík var einki serlig, og einki bendir á, at nakað føroyskt lið verður í næsta Europa Cup umfarinum.

Annan sunnudag verður ikki spælt í landskappingini í 1. deild. Tá verður fyrsti HM undankappingardysturin á skránni. Slovenia skal spæla móti Føroyum á Svangaskarði. Í hesi vikuni verður føroyska landsliðið úttikið. Bæði úttøkan og dysturin verða spennandi, so fótbóltshugaðu føroyingarnir nýtast ikki at keða seg. Tað er nóg mikið at tosa um og at gera metingar um!

JH




Við 12. manni til Zurich

Flogið verður úr Vágum við Atlantic Airways tann 03. oktobur kl. 11:00 til Kastrup. Bussurin heintar okkum í Kastrup og koyrir beinleiðis til Zurich, har vit koma um morgunin tann 04. oktobur, vit hava hotelli frá kl. 12:00.

Gist verður á einum trý-stjørnaðum hotelli beint uttan fyri býin. Vit koma eisini at hava bussin nakað til taks meðan gist verður í Zurich.

Tann 08. oktobur verður farið heimaftur við sama bussi, har koyrt verður um kvøldið. Heimferðin er við Atlantic Airways úr Kastrup til Vágar tann 09. oktobur kl 15:15.

Bussurin er ein modernaður sovibussur við video og WC.

Kostnaður - fyri hvønn ........ 4.950,-

*Íroknað er flogferð Vágar-Kastrup-Vágar, ferðaavgjøld, bussur í 7 dagar við øllum avgjøldum, atgongumerki til dystin og gisting í dupultkamari í 4 nætur við morgunmati. (sovið verður tvær nætur í bussinum, tá er morgunmaturin ikki íroknaður).*

*Avsláttur fyri tey, ið koma við í Kastrup er DKK 2.100,-*

***Tað er MB-Tours, ið samskipar ferðina fyri 12. mann. Tilmelding hjá MB-Tours á tlf. 32 21 21.***

Vit hava nøkur pláss til dystin Manchester Utd. - Sunderland 9. sep. 2000 Ring og hoyr nærri.

MB-Tours

Bryggjubakki 2 Boks 3021 FO-110 Tórshavn Faroe Islands
Tel (+298) 32 21 21 Fax(+298) 31 44 53
mb-tours@mb-tours.com www.mb-tours.com